# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20



## SPURDÓMUR : HVAT SMAKKAR VATN AV



Granskarar:

Magnus, Ró, Rebekka, Dánial, Beinir, Hannah, Píl, Elsebeth, Amanda og Annika

# INNGANGUR

Vit hava arbeit við at finna út av hvat vatn smakkar av.

Vit hava spurt familju, vinir og børnini og læraranir í skúlanum hvat tey halda vatn smakkar av. Vit gjørdu eisini eina smakki kanning har vit tóku vatn forskelia staðani frá og vit tóku koppar og bóðu børn koma at smakka. Vit hava prøva nógv, men vit hava ikki funi naka endaligt svar.

Lærari:

Lilian Clementsen

lilian.clementsen@skulin.fo

Luttakarar: Amanda Nielsen, Elsebeth av Kák, Hannah Warner, Dánial Sørensen, Beinir Ørvarodd, Magnus Tungá, Píl av Skarði, Rebekka Petersen,  Ró Højsted, Annika Zachariasen

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

- Smakkikanning
- Vitjan á vatnverkinum
- Spurnarkanning
- Kanning av vatni heimanífrá
- Spurningar til Føroya Bjór

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hvat vatn smakkar av.

Vit valdu tað tí at vit undraðust á hvat tað smakkar av.



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Fyrst høvdu vit nógvar spurningar og so valdu vit tríggir spurningar burtur úr og tað var:

- hvussu fær man grundlitir
- hví sær man ígjøgnum glas
- Hvat smakkar vatn av

tað vit valdu var: **hvat smakkar vatn av**



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit ætlaðu at gera eina smakki kanning. Vit ætlaðu at spyrja fólk hvat tey hildu at vatni smakkaði av og um tey vistu hvar tað kom frá.

Vit ætlaðu at taka vatn úr Danmark, keldu, einari keyptari fløsku, dunki og einum krana og vita um munur var á

Vit ætlaðu at fara á vatnverkið at spyrja nakrar spurningar um vatni.

Vit ætlaðu eisini at ringja til Føroya Bjór.

Vit ætlaðu at taka vatn við í skúlan og vita um vit smakka mun á vatninum hjá hvørjum øðrum.



# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

## 1. Smakki kanning

Vit hava veri á vatnverkinum og spurt Svenning Poulsen nakrar spurningar um vatn og vatn smakkir .

Vit fóru til eina keldu har tey fáa vatni frá og filtu eina vatnfløsku við keldu vatninum

Maðurin hjá Liliuni (okkara lærari) var í DK tá í vit arbeidu við smakki kanningum, so hon spurdi um hann kundi taka vatn við frá Danmark, og tað gjørdi hann.

Og vit tóku vatn úr krananum úr skúlanum.

Og Elsebeth og Ró runnu til Samkeyp at keypa eina vatnfløsku

Og vit tóku vatn úr vatn dunkinum hjá Anniku.

Og tað vit brútu vatnini til var at gera eina smakki kanning, har vit bóðu børnum og læraranum í skúlanum koma at smakka, hvar vatnini komu frá. vit tóku fimm koppar og skrivaðu tøl á teir og koyrdu eitt slað av vatni í hvønn kopp. Hannah, Píl og Dánial gjørdu eitt pappír *fylgiskjal 2* har tað stóðu allir møguleikanir á, har vit skrivaðu hvat tey hildu vatni smakkaði av.






# 2. Vitjan á Vatnverkinum





Vit hava vitja vatnverki og spurt tey um hvat tey halda vatn smakkar av og um vatni smakkar ørvísi áren tað verur reinsa. Tað verur fyrst reinsa við sandi fyri at fáa flugur, mold og anna úr. Aftaná var tað kort ígjøgnnum ultraviolett ljós fyri at drepa bakteriur. Og um streymurin fer brúka tey klor at drepa tar. Um summari er tað nógv fleiri bakteriur í vatninum. Og gomul fólk tola ikki so val vatni, um tað ikki er reinsa. Veggurin á vatnbrunninum er 35 cm tjúkkur.



# 3. Spurnarkanning

Vit hava gjørt eina spurnar kanning.

Vit spurdi hinar flokkarnar um hvat tey halda vatn smakkar av. So skuldu tey skriva tað á eitt pappír. Vit høvdu eisini nøkur pappír við heim.













foreldur, vinir og systkin
7
6
5
4
3
2
1
0
ongum
frískt
mold
vatni
jarni
luft
klor
salt
milt
kava
væl

# 4. Kanning av vatni heimaní frá

Vit høvdu øll vatn við heimani frá í einum frysti  posa og vit øll smakkaðu vatni hjá hvørjum øðrum.

Sjálvt um alt var úr krana smakkaði tað alt ymiskt Alt smakkaði ymist uttan tvey, tey smakkaðu næstan líka. Vit hava øll ymiskar smakki sansir onkur helt at tað smakkaði gott og onkur illa.

Vit settu vatni á borði so tað bleiv heitt.

Øll hildu vatnið smakki verri tá tað var heitt.







# 5. Spurningar til Føroya Bjór

Vit ringtu til Føroya Bjór men tey bóðu okkum senda ein teldupost men tey svaraði ikki. Spurningarnir vit skrivaðu til Føroya bjór :sí fylgji skjal 1



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

1. Tá vit gjørdu smakki kanning av vatninum heimanum frá. so smakkaði tað hjá onkrum av plastiki og hjá tveimum næmingum smakkaði tað av mjøli.
   Mann kann ikki siga út frá hesari kanning, hvat vatn smakkar av, tí øll siga so ymiskt.

2. Á vatnverkinum funnu vit útav at vatni smakkar ikki líka árennð tað er reinsa og aftaná. Og øll í flokkinum vóru samd um at vatni smakkaði betri árin tað bleiv reinsa. Og vit funnu útav at tey brúka sand til at fáa smákikt og annað úr. Og tey brúka ultra violet ljós at drepa sjúkur og bakteriður, og vissi streymurin fer so brúka tey klor at reinsa vatni vit, og tá smakkar tað ørðvísi.

3. Tá vit gjørdu smakkikanning funnu vit útav at mest av fólkunum kendu ikki mun á vøtninum, man nøkur kendu mun. Vit bóðu familju, vinir, og øll í skúlanum um at skriva hvat tey hildu vatn smakkar av, og til samans var tað 70 sum svaraðu. Og tað mesta sum tey svaraðu var onki og tað var 18, og 9 svaraðu jarn +

4. Spurnarkanningin
   Vit funnu út av at tey flestu søgdu at vatni smakki onki. 70 fólk blivu spurd og 18 søgdu at tað smakkaði onki. 9 sødu jarni annars sødu tey ymist annað



# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit ætla at biðja fólk fáa sær vatn hvønn dag í eina viku og skriva niður hvat tey halda at vatni smakkar av og vita um tað smakkar líka hvønn dag.

Vit ætla eisini atbiðja fólk koma og smakka nógv vatn úr forskelligum kranum og vita um tey smakka nakran mun.

Vit ætla eisini at biðja fólk koyra vatn í forskellig íløt t.d ein plastikk kopp ella ein karaffil.

Eisini vissi man ferð ein túr í fjøllini og man finnur eina keldu og hevur vatn við so kann man vita um tað smakkar ymiskt.

Og vissi man fer ein túr til t.d frá Sandoynni til Vágar so kann man vita um tað smakkar líka.

Og man kann eisini fáa sær t.d coco pops og fáa sær vatn aftaná ella bolla við súltutoy á og vita um tað smakkar líka.

Ella vissi man er akkurát vaknaður og fær sær eitt glas av vatni, ella fer í song og fær sær eitt glas av vatni so kanska smakkar tað ymiskt.

Ella vissi man er keddur, glaður ella illur so kanska smakkar tað ikki líka.

Ella vissi man er úti og fær sær vatn ella er inni og fær sær vatn so smakkar vatni kanska ikki líka.

Ella vissi man hevur haft te í koppinum ella kaffi og koyrur vatn í koppin so kanska smakkar tað ikki líka.

Vatnið kann smakka av nógvum ymsum annað uppá hvussu góður smakki sansurin er.

# FYLGISKJØL

## 1. Fylgiskjal 1

Spurningar til Føroya Bjór

1. Hvar fáa tit vatni ?
2. Er tað líka mikið hvar man tekur vatni ?
3. Gera tit nakað við vatni ?
4. Smakkar plastikkið at ?
5. Er tað munur á smakkinum áðrenn tað fer í fløskuna og aftaná ?
6. Hvat smakkar vatn av ?

# SMAKKI KANNING

1

## VATN

Úr keldu smakkar av:________________________________________

Úr DK smakkar av :________________________________________

Úr flóskum smakkar av :______________________________________

Úr krana smakkar av :_______________________________________

Úr dunki smakkar av :_______________________________________

2

| ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
|---|---|---|---|---|
| Keldu | DK | Fløsku | Krana | Dunki |

3.